DAGSINS MEINING

Í upploysn – og ábyrgdarloysi valdar

Vargur er komin í samgonguna. Í óðum verkum hevur Óli Breckmann lagt fram eitt uppskot um skattalætta, hóast hann sjálvur hevur tikið grundarlagið undan møguleikanum at lækka skattin.

Eftir at Bjarni Djurholm boðaði frá, at hann legði ikki uppskotið til verkætlanarlóg um Norðoyatunnilin fram, lupu Rúna Sivertsen og Karsten Hansen upp á tjóðlegg. Tey sóu valagnið hvørva út millum tonglar og tara, út á streymasjógv, og so var eingin góðgætisbiti at halda fyri munnin á norðoyingum.

Tiansheldur mátti Anfinn Kalsberg, sjálvur løgmaður, leggja uppskotið fyri tingið, hóast uppskotið bara er í hálvum gekki. Tann endaliga tunnilsleiðin er ikki løgd, og tí er kostnaðurin heldur ikki greiður. Men Anfinn Kalsberg skal jú eisini hava okkurt at taka úr sjáttuni, tá politisku avrikini skulu vigast á vektini hjá veljarunum. Tann stóra verkætlanin um fullveldi, sum hann legði alla sína orku og politisku framtíð í, kollsigdli. Vit eru tí ikki komin ein fjórðing longur fram á sjálvstýrisleið enn í 1998.

At panikkur er komin í fólkafloksfólk, er ikki so løgið, tí veljarakaningar higartil hava ikki verið til vildar. Tí var altíð væntandi, at Óli Breckmann for at gera okkurt sprellið nú upp undir valið. Og politiskt er hann hann snúin, tí hann hevur drigið fram gamla uppskotið, sum Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin løgdu fyri tingið fyri skjótt hálvumøðrum ári síðani.

Hetta ger hann av tveimum orsøkum. Hann kann vóna, at andstøðuflokkarnir taka undir við uppskotinum saman við Fólkaflokkinum, og so kann hann vísa á í valstríðnum, at hann slóðaði fyri enum skattalætta. Um Óli Breckmann ikki fær andstøðuna í leypin, so kann hann brúka tað ímóti hesum báðum flokkunum: -Her síggja tit, Javnaðurin og Sambandið róptu upp um skattalætta, men tá flokkarnir skuldu vísa tað í verki, stungu teir halan millum beinini!

Í prinsippinum kunnu andstøðuflokkarnir óivað taka undir við uppskotinum. Hinvegin, var Óli Breckmann seriøsur, hevði hann lagt uppskotið fram, ella kravt, at Karsten Hansen kom við tí, tá fíggjarlógin var til viðgerðar, so tað varð tikið við í hana. Fíggjarlógin hevur hall, og skulu 80 mió.kr. verðið lætnar í skattalætta, økist hallið so nógv, at talan er um ábyrgdarloysi.

Henda vikan í politikki er dømi um, at landsstýrissamgongan er í upploysn, er ábyrgdarleys, og at løgmaður hevur mist takið á samgongu og sínum egna flokki. Tí er henda samgongan heldur ikki nakað grundarlag at seta eina nýggja samgongu á eftir valið. Tað eigur veljarin at leggja sær í geyma tann 30. April.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Karaktersjálvmorð

Atli P. Dam
28. febr. 2002

Hvørja ferð, Høgni Hoydal rennur undan og er um at verða "fangaður" í egnum ósannindum, kemur mær fyri, at hann sum óargaungi í neyð rópar aftur um herðar: "karaktermorð."

Hetta medianýyrði, sum eins og tey mongu "mediastuntini", sami maður hevur gjørt seg kendan fyri, hava gruggað tjakið, so barnið í "nýggju klæðum keisarans", tá tað undrandi avdúkar at keisarin í veruleikanum er nakin, gerst ljóti skurkurin, sum dálkar hvíta svanan hjá Páll á Reynatúgvu.

Men lat okkum bert leggja hetta nýmótans fjasið um karaktermorð til viks og á føroyskum finna fram, um vit tala um vánaliga ella góða muru, grundarringan ella væl kjølfestan persón, álitismann ella lýguvætti, ella bert ein, ið altíð hevur fyri neyðini at smápella.

Uttan mun til hvørja karaktermynd talan er um, kunnu allir skjóta seg sjálvan í fótin, gera sjálvmál uttan at vilja tað, men at menn fremja beinleiðis karaktersjálvmorð er heldur sjáldsamt.

Lodrættar lygnir

Í umrøðu síni av undirgrundarspurninginum í Dimmalætting 28. februar, ber Høgni fram tvær lodrættar lygnir: 1) At Javnaðarflokkurin var til reiðar at ganga undir eina "grønlendska loysn" og 2) at Tjóðveldisflokkurin forðaði hesum.

Øll sum kenna til hetta málið vita, at Atli Dam í 13 ár (aftaná grønlendska heimastýrið var stovnsett) helt rimmarfast um aðra loysn enn ta grønlendsku, nevniliga hana, sum vit løgdu fram fyrst í áttatiárunum: At føroyingar skuldu hava fullan avgerðarrætt viðvíkjandi undirgrundini, t.v.s. nær og hvar virkast skuldi, hvør skuldi virka, hvør skuldi lóggeva, hvør skuldi hava endaligu ábyrgdina, og ikki minst at bert føroyingar skuldu avgera, um sigast skuldi nei til undirgrundarvirksemi.

Tjóðveldisflokkurin hevði so ómetaliga lítið við undirgrundarmálið at gera. Í 85' og 86' bleiv mest arbeitt á embætismannastigi av sera dugnaligum monnum, sum leitaðu fram føroyskt skjúts og demonteraðu danskt lóður, soleiðis at vit í 87' og 88' sluppu burtur úr teirri naggatódn, sum var íkomin.

Ein pott av olju

Havi merkt mær, at Jógvan Durhuus av og á hevur havt hug til at geva sær sjálvum eina gloriu sum bjargingarmaður, men tað verður hann so um, men at lúgva sleppi eg honum ikki.

Tað er helst fundurin í 1988, har vit at enda fingu semju við Schlüter um framhald av samráðingunum, og rætt er, at teir trekir tóku undir við teirri semju, sum Atli Dam og Poul Schlüter eftir embætismanna tilmæli vóru klárir at gera.

Endaleysar telefonsamrøður heim til einasta tjóðveldismann, sum hevði nóg víðan sjónarring og dirvi til at meta um, nær næsti leikur skal fremjast og tordi at standa við ábyrgdini nevniliga Finnboga Ísakson.

Gangi út frá, at - sum nakrar ferðir fyrr – var tað Finnbogi, sum tendraði grøna ljósið, kanska tí at Atli Dam tá troyttaðist av at bíða og segði: "Nú skrivi eg undir, óansæð um tjóðveldismenn floyta ella dansa."

At teir tóku undir at enda er prísverdugt og ikki at lasta, so um nakrar milliardir pottar av olju einaferð fáast úr dýpinum, so lat Jógvan Durhuus eiga heiðurin av tí eina pottinum.

Høgni, har framdi tú karaktermorð fyri egnari hond.

Eldraøkið skal dagførast

Elin Lindenskov
valevni Javnaðarfloksins
http://www.lindenskov.coelin@lindenskov.com

Bíðilistarnir til ellis- og røktarheim skulu beinast burtur. Heimarøktin skal útbyggjast við døgnrøktarskipan við tilkalliskipan.

Javnaðarflokkurin fer komandi fýra árini at útbyggja eldraøkið við 160 nýggjum ellis- og røktarheimspláss um. Eldrasambýlini skulu skipast runt um alt landið og lagast eftir tørvi. Vit mugu útbyggja soleiðis, at røktarsjúklingar fáa røktarpláss, minnisveik (dement) skulu búgva í smærri, vardum eindum, og eldri rørsk fólk skulu hava møguleika at búgva saman við øðrum eldri á ellisheimum ella sambýlum..

Vit skulu skipa so fyri, at eldri fólk, sum ynskja at flyta úr stórum dýrum sethúsum, fáa møguleikan at flyta inn í eldraíbúð.

Til røktarkrevjandi eldri fólk, sum ynskja at verða í egnum heimi, skulu skipast møguleikar fyri dag- og døgnumlætting í longri tíðarskeið.

Til sjúklingar, sum eru líðugt viðgjørd av lækna, men framvegis hava tørv á uppvenjing og av ymiskum orsøkum ikki kunna fara heim, skal skipast ein uppvenjingarstovnur.

Sjúklingurin skal kunna búgva á stovninum, til venjingin er liðug.

Vit skulu bjóða okkara gomlu ein tryggan og góðan aldurdóm, har virðingin og lívsdygdin hjá tí einstaka er í hásæti.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mík. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mík. kl. 15	Mík. kl. 12	Mík. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Atli Hansen og pensionistarnir

Sámal Petur í Grund
landsstýrismaður

Tá menn fara at úttala seg um nakað sum teir ikki eru inni í, ella hava skil uppá, so kann tað skjótt føra til mangulfulla ella beinleiðis skeiva informatión.

Hetta gjørdi seg galdandi, tá valevni sambands floksins í Eysturoynni, Atli Hansen skrivaði grein um pensionistarnar í Dimmalætting týsdagin 26.februar.

Við eini yvirskrift, ikki minni rámandi enn: "Pensionistarnir aftur sleptir uppá fjall", breiðir Atli seg út við, at hendan samgongan ikki hevur ráð til at bøta um viðurskifti pensionist anna.

Sannleikin er ein heilt annar Atli Hansen. Hendan samgongan hevur gjørt so stórar batar á pensiónsøkinum, sum eingin samgonga frammanundan hevur gjørt tað.

Heldur ikki í tíðarskeiðnum hvar Sambandsflokkurin tók um róðrið, 1994 - 1998.

Tað kom ikki ein króna omaná pensiónirnar hetta tíðarskeiði - tær blivu ikki eingang prístalsreguleraðar.

Í skrivandi løtu liggur eitt uppskot um javning av almannaveitingum í trivnaðarnevnd løgtingsins, hvar landsstýrið mælir til eina hækkan av pensiónunum.

Hetta uppskotið, saman við broytingum í skattalógini kemur at viðføra, at nærum allir fólkapensionistar í Føroyum koma at vera betri fyri enn fólkapensionistar í Danmark.

Hesar broytingar í pensiónsviðurskiftunum vera framdar samstundis sum samgongan hevur skert blokkstuðulin við uml. 360 milliónum.

Til seinast í somu grein, sigur Atli Hansen, at "Sambandsflokkurin fer at arbeiða fyri at okkara pensionistar fáa somu livilíkindir sum í londunum rundanum okkum. Hetta er partur av okkara stevnuskrá".

Sum eg longu havi fört fram, og kann prógva, so eru viðurskiftini hjá okkara fólka-pensionistum við framløgdu broyting, komin á sama støði, sum í londunum rundanum okkum. Takka verið sitandi samgongu.

Ikki eitt einasta uppskot sum kom fram í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina hevði givið so stórar batar sum broytingin sum landsstýrið er í fer við at fremja.

Atli Hansen blandar í somu grein ætlanir landsstýrisins um ein framtíðar eftirlønar-skipan, og verandi pensiónsviðurskifti saman.

Tann ætlaða eftirlønarskipanin sum tíverri ikki bleiv løgd fram í hesum umfari, hevur ikki nakað við núverandi pensiónir og pensionistar at gera. Hon skuldi tryggja okkum, at pensiónsviðurskiftini í framtíðini koma at liggja í tryggari legu.

Atli Hansen vísir í endanum á grein síni í punktum, hvat Sambandsflokkurin fer at arbeiða fyri aftaná valið.

Eitt av punktunum er hækkan av pensiónunum. Men sambært somu grein, so stendur í stevnuskrá Sambandsfloksins, at pensiónirnar skulu vera á sama støði sum í londunum rundanum okkum. Eg gangi útfrá, at broytingarnar sum liggja í løgtinginum vera samtyktar, og so eru pensiónirnar á sama støði, ella hægri enn í grannalondum okkara.

Eitt annað punkt er: Tilboð um meira ansing og røkt - alt samdøgrið. Hetta er eisini ein spurningur sum sitandi samgonga hevur arbeitt við. Broytingin sum bleiv framd í pensiónslógini seinasta heyst §12.a bleiv júst gjørd fyri at kunna veita ansing í heiminum, eisini á náttartíð.

Eitt annað punkt er: Styrking av sambýlum í nærumhvørvinum. Í býtinum millum land og kommunu eru sambýlini ein kommunal uppgáva, sum bert fær avmarkaðan studning úr landskassanum. So spurningurin er um ikki Atli Hansen eigur at býða inntil tað aftur verður kommunuval, fyri at loysa tann trupulleikan. Annars eru fleiri sambýli í umbúna.

Eitt punkt er: At útbyggja og dagføra okkara sjúkrahús. Eg veit ikki hvussu long tíð er síðani Atli Hansen var í høvuðsstaðnum, men tað er eitt faktum, at vit eru í gongd við at útbyggja landssjúkrahúsið - reisugildi verður 1.mars.

Sum eg longu havi gjørt greitt, so hevur valevni sambandsfloksins í Eysturoynni, Atli Hansen, misskilt okkurt, ella ikki sett seg nóg væl inní hvat fyriferst í samfelagnum og í politisku verðini.

Fleiri av málum Sambandsfloksins til komandi valskeið eru loyst ella um at vera loyst, so Sambandsflokkurin hevur helst sigta ov lágt, ella ikki lagt merki til at sitandi samgonga faktiskt hevur framt ein stóran part av tí sum teir hava sett sær fyri.

Skal Sambandsflokkurin vera við í eini samgongu aftaná valið, so skal hann helst hækka seglføringina eitt sindur, um hann skal standa mál við tær ætlanir aðrir flokkar hava boðað frá.

Við vón um eitt sindur meira verunleikakent valstríð.

Hvat merkir frælsið fyri meg

Kaj Leo Johannesen
Sambandsflokkurin

Henda spurningin skulu vit taka støðu til komandi Løgtingsval, tað kemur at ávirka, í einum samfelagi, sum hevur sjógvin á at líta, tað er eingin ivi, at komandi Løgtingsval verður ein fólkaatkvøða um Loysing frá Danmark við verri umstøðum ella Samband við Danmark við tryggari umstøðum.

Eg fari við nøkrum reglum at koma inn á hvat undiritaði hugsar um, ella meinar við, tá frælsishugtøk verða nevnd millum manna, og hvat heilt konkret "frælsið" hevur at siga fyri meg, lata meg sláa fast beinaveg, og siga, at eg eri ikki ein av teimum, sum halda at tey sum ikki hava somu meining sum eg, ikki skilja hvat frælsið veruliga merkir.

Tað fyrsta eg hugsið tá talan kemur inn á frælsið, er tað sum eg gerði við hesi greinini, nemliga at eg livi í einari frælsari tjóð, sum eg eri sera góður við, hvar eg havi loyvi at siga mína meining, uttan at verða forfylgdur fyri mínar politisku hugsjónir.

Frælsi fyri meg, er at kunna búgvi undir taki, uttan at fara svangur til songar.

Frælsi fyri meg er at gleðast um at verða raskur, og at kunna gerða eitt arbeiði fyri land og fólk.

Frælsi fyri meg er at kunna síggja børn míni vaksa upp, uttan hóttanir um yvirgang og harðskap.

Frælsi fyri meg er at taka ábyrgd av mínum egna lívi, uttan mun til hvat onnur siga.

Frælsi fyri meg er ikki at geva øðrum skyldina fyri egnu lastir ella egnu dygdir.

Frælsi fyri meg er at kunna ganga tryggur úti, uttan at verða álopin.

Frælsi fyri meg er at kunna anda reina luft niður í lungini

Frælsi fyri meg er at vita at eg kann koma undir læknahond um eg gerðist sjúkur

Frælsi fyri meg er at vita at børn míni, hava rættindi at mennast í lívinum.

Tá eg nevni meg sjálvan, er tað tí, at tað sum eg skilji við frælsi, helst ikki er tað sama, sum onnur halda verða frælsi.

Eg vil at enda takka fyri, at tað er víst mær tað álit at koma uppá Sambandslistan til komandi Løgtingsval, og fari eg at berjast fyri Føroyar, soleiðis at tað ikki kemur uppá tal at hótta vælferðina hjá okkara stoltu tjóð.

Føroyskar heildarloysnir

- Men ikki fyrrenn vit eru rýmd av skútuni!!

Jákup Fróði Djurhuus
Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Hvørjaferð løgtingsval er í hondum, byrjar skriving um føroyskar loysnir og føroyskar heildarloysnir. Hetta verður serliga skriva av umboðum fyri sitandi fullveldissamgongu, sum hevur sitið við valdið seinastu 4 árini, men sum púra hevur gloymt at gjørt nakað fyri at fremja føroyskar loysnir ímeðan møguleikin var tilstaðar.

Tað mangla 650 røktarheimspláss

Kristina Háfoss skrivar í Dimmu tann 11 jan um støðuna á landssjúkrahúsinum í einum broti.

"Tá ið 18 sjúkrasystrar søgdu seg úr starvi á B6 herfyri, og kravdu fleiri starvsfólk, var hetta eitt av mongum dømum um ein trupulleika, sum er eitt tekin um aðrar størri trupulleikar"

Hetta er púra rætt. Trupulleikin er nevniliga hesin. Tað manglar peningur á økinum, og tað mangla røktarheimspláss. Umleið 250 pláss eru, og tørvur er kanska á einum 650 plássum aftrat.

Verulleikin er tann, at sitandi samgonga, sum Kristina Háfoss stuðlar av fullum huga, bert hevur sett 10 mió kr av til at røkka føroysku heildarloysnini á røktarheimsøkinum í ár.

At byggja eitt ellisheim kostar 1 mió kr pr persón. At reka tað kostar 360,000 kr pr persón. So um fólkini verða flutt úr einum bygningi í annan, loysir ikki tann grundleggjandi trupulleikan.

Nevniliga, at tað manglar peningur, og at tað mangla pláss. Tað er líkasum at man við gandaorðinum um føroyskar loysnir,letur eyguni aftur fyri, at tað er eitt beinleiðis samband ímillum politisk ynskir, og tað sum tað kostar at fremja tey í verki.

Tað skulu sostatt avsetast 650 mió kr til íløgur, og kr.234 mió kr av til rakstur aftrat, fyri at vera ajour.

Tey tosa um føroyskar loysnir, uttan at siga nakað ítøkiligt um, hvørjar serligar føroyskar loysnir talan er um.

Sostatt er talan bert um snakk úr leysum lofti, nú løgtingsval aftur er í hondum.

Almenn umsiting

Tann annars so royndi Kjartan Hoydal skrivar úr London um eina stóra almenna umsiting. Um hvussu bíligt tað kundi verið, um vit gjørdu føroyskar loysnir. Sum dømi nevnir hann oljumálastýrið.

Øll vita jú, at oljumálastýrið í veruleikanum er ein útbygging av vinnumálastýrinum, tí at Sjálvstýrisflokkurin skuldi hava ein Landsstýrismann við hartil hoyrandi embætisfólki og dingledari.

Tað er kanska tað mest føroyska við loysnini.

Samstundis hava eisini Landstýrismenn tjóðveldisfloksins fylt stjórar og deildarleiðarar inn í almennu fyristingina seinastu 4 árini, so tað stendur eftir.

So her lekur ímillum teori og praksis, nú meðan kjansurin hevur verið til staðar at finna hesar serligu føroysku loysnirnar, sum onki kosta.